# Magnus Heinason

Og tað var Magnus Heinason,
eitt reystmenni hann var:
um bylgjan breyt um stevnið hátt
hann skjøldin sín væl bar.
*Og nú siglir hann,*
*Magnus yvir havið.*

2. Og tað var Magnus Heinason,
eitt reystmenni at sjá;
í føroyskum búna djarvur var
sum kempa í brynju blá'.

3. Og tað var Magnus Heinason
við blíðum eygnabrá;
men møttu honum ránsmenn frekir,
var hann grimur at sjá.

4. Og gekk hann fram á skipabunka,
eldur úr svørði reyk;
tá høgdi hann á ránsmans háls,
so høvur av herðum feyk.

5. Og minnist á Magnus Heinason
so víða um Føroya sker:
hvør tindur og hvørt andnes bratt
hans minnisvarði er.

6. Í hjørtum livir minni um hann,
enn gongur um hann orð,
og áðrenn hann í Føroyum doyr,
munna klettar fara í sor! –

7. – Men hygg har oman á Gamlatorg!
Har er óført fólk,
alt tysur um ein høggustabba
saman í ein bólk.

8. Har eru menn og konur við
og børn, av kulda bleik; –
hví hyggja øll at reyða stabba
sum á sorgarleik?

9. – Og tað var Magnus Heinason,
sín bana har hann har neyt;
tann edilingur misti lív,
so blóð á stabba fleyt.

10. Hann var ov stórur, var ov høgur
fyri miðalmenn;
tí vípan hatar kongaørn,
sum fyrr, hon ger tað enn.

11. Og høvur hans á reyða stabba
høgdu níðingar av;
teir hugsaðu, grøvin skuldi vera
kempuni gloymskunnar hav.

12. Og eikin følnar, maður doyr,
men aldri doyr minni mans;
og Magnus Heinason livir enn
og avreksverkini hans.

13. Og hygg um Føroyar víða hvar,
á sund og bygdarlag,
og hvar er so tað ránsmannalið,
sum rændi góðs og fæ?

14. Og hygg um Føroyar víða hvar,
har líðin stendur breið;
hvar finnur tú kvinnu ella mann,
sum minnist á Magnus ei?

Frederik Barfod (1811-96), danskur søgumaður, yrkti hesa vísu um Magnus Heinason, og Símun av Skarði týddi hana. Vísan stóð í Ungu Føroyum desember 1910. Her er hon úr Lesibók, øðrum parti eftir A.C. Evensen, 2. broyttu útgávu 1922. jd.